FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Reglugerð fyri størv á Fróðskaparsetri Føroya

## Rektari, vararektari og fyrisitingarstjóri

**§ 1.** Stýrið setur rektara. Vararektari, dekanar og fyrisitingarstjóri verða settir av stýrinum eftir tilmæli frá rektara. Onnur størv á Setrinum verða sett av rektaranum. Rektarin hevur dagligu leiðsluna á Fróðskaparsetrinum innan teir karmar, sum stýrið hevur ásett og sambært ásetingunum í rektarafyriskipanini.
Fyrisitingarstjórin er ovasti leiðari fyri samlaðu umsitingini á Fróðskaparsetrinum innan teir karmar, stýrið og rektarin hava ásett, og sambært ásetingunum í fyriskipanini fyri fyrisitingarstjóran.

## Dekanar

**§ 2.** Gransking og undirvísing fer fram á tveimum megindeildum, sum stýrið góðkennir. Ovastu fakligu og fyrisitingarligu leiðsluna á megindeild hevur dekanur.
*Stk. 2.* Dekanurin skal tryggja dygdina í gransking og undirvísing og samanhang millum gransking og undirvísing. Dekanurin hevur somuleiðis ábyrgdina av, at øll gransking, undirvísing og annað virksemi á Setrinum fer fram sambært reglum og málum, sum Fróðskaparsetur Føroya hevur sett sær. Nærri ásetingar fyri dekanstarvinum eru at finna í fyriskipanini fyri dekanar.
*Stk. 3.* Við góðkenning rektarans kann dekanur seta leiðarar fyri starvsstovur, søvn, deplar o.a. á megindeildini, eins og undirvísingarleiðarar fyri útbúgvingar.
*Stk. 4.* Dekanurin hevur ábyrgdina av, at ein ábyrgdarlærari, við støði í teimum góðkendu námsætlanunum, sær til, at skeiðslýsingar og undirvísingarætlan verða gjørd, og at hetta javnan verður dagført.

## Vísindalig granskingar- og undirvísingarstørv

**§ 3.** Minstakravið til lærarar og granskarar á Fróðskaparsetrinum er kandidatprógv ella masterprógv sambært Bologna avtaluni.

**§ 4.** Føst vísindalig størv eru *professari, lektari* og *námslektari.*
*Stk. 2. Professari* skal hava hægsta vísindaliga og fakliga førleika, góðan pedagogiskan førleika og hollar fyrisitingarroyndir í sambandi við hægri undirvísing og gransking. Professari hevur hægstu fakligu ábyrgdina í sínum fakøki.
*Lektari* skal hava sera góðan vísindaligan og fakligan førleika á sínum øki. Lektari skal hava góðan pedagogiskan førleika og fyrisitingarroyndir í sambandi við hægri undirvísing og gransking.
*Námslektari* er eitt fulltíðar undirvísingarstarv. Námslektari skal hava góðan fakligan førleika, rímiligan vísindaligan førleika, fyrisitingarroyndir í sambandi við hægri undirvísing, men fyrst og fremst góðan pedagogiskan førleika, og verða góður undirvísari. Námslektari hevur vanliga ikki granskingarskyldu, men kann frá dekani fáa tillutað granskingartíð.

**§ 5.** Tíðaravmarkaði granskingar- og útbúgvingarstørv eru *adjunktur, ph.d.-lesandi og post-doc.-granskari.*
*Stk. 2. Adjunktstarvið* er eitt tíðaravmarkað útbúgvingarstarv við møguleika til fast starv sum lektari, um lektaratreytirnar verða loknar. Fyri at verða sett/ur í starv sum adjunktur er ph.d.-útbúgving ella samsvarandi granskingarførleiki ynskiligt, men hjá einum við skjalprógvaðum granskingarevnum er møguleiki fyri at skriva ph.d.-ritgerð og menna seg bæði granskingarliga og undirvísingarliga í adjunkttíðini, sum vanliga er 4 ár. Um umstøðurnar tala fyri tí, kann adjunkttíðin ásetast at vera 6 ár. Møguleiki er at verða settur sum adjunktur við serligum denti á gransking og granskingararbeiði. Í góðari tíð, áðrenn adjunkttíðin gongur út, skal adjunkturin lata seg lektarameta, og kann adjunkturin setast í starv sum lektari, um metingin er jalig og um umstøðurnar loyva hesum. Um metingin ikki er jalig, verður adjunkturin loystur úr starvi.
*Stk. 3.* Fyri ph.d.-lesandi og post doc.- settar granskarar eru serligar reglur galdandi.

**§ 6.** Tíðaravmarkaði parttíðar vísindalig undirvísingarstørv eru *adjungeraður professari, adjungeraður lektari og adjungeraður námslektari*. Harafturat koma so *tímaløntir lærarar*.
*Stk. 2.* Til adjungeraðu størvini verða sett somu fakligu krøv og krøv um meting sum til føstu størvini, serliga í teimum evnisøkjum ella fakum, sum tann adjungeraði undirvísir í.
*Stk. 3***.** Fyri tímalærarar og onnur tímalønt vísindalig hjálparfólk eru serligar reglur galdandi, og avtala verður gjørd við hesi í hvørjum einstøkum føri.

**Fyrisitingarlig og tøknilig størv**
**§ 7.** Fyrisitingarligu og tøkniligu størvini á Setrinum krevja ymiskar førleikar. Krøvini verða nágreiniliga lýst í skjali, sum liggur til grund fyri starvinum og í sjálvari starvslýsingini. Rektarin setur øll hesi størv, uttan fyrisitingarstjórastarvið, sum verður sett av stýrinum eftir tilmæli rektarans.

**Metingarnevnd og setanarnevnd**
**§ 8.** Í sambandi við setan av akademiskum undirvísingar- og granskingarstørvum setur rektarin eftir tilmæli frá dekani eina metingarnevnd, hvørs limir skulu hava minst sama førleika, sum starvið, ið metingarnevndin skal meta um, krevur. Uppgávan hjá metingarnevndini er at meta um fakliga støðið hjá hvørjum einstøkum umsøkjara í mun til tey krøv, sum verða sett í starvslýsingini og serligum viðtøkum um starvið. Metingarnevndin skal vísa á, hvør hevur besta fakliga førleikan. Minst tveir av limunum í metingarnevndini skulu vera frá øðrum universiteti ella granskingarstovni. Rektarin tilnevnir formannin í metingarnevndini. Formaðurin samskipar nevndararbeiðið og sær til, at metingin er skjalfest á fullgóðan hátt.
*Stk. 2.* Rektarin tilnevnir eftir tilmæli frá dekani eina setanarnevnd. Uppgávan hjá setanarnevndini er í fyrstu atløgu at gera eina heildarmeting av, um fakligi førleikin hjá umsøkjarunum er egnaður til ætlaða undirvísing í starvinum, um granskingaráhugamál og -førleiki hjá umsøkjarunum eru áhugaverd fyri Setrið, og um samstarvsmøguleikar kunnu verða innan og uttan fyri Setrið. Setanarnevndin letur við støði í heildarmetingini rektaranum tilmæli um, hvørjar umsóknir eiga at verða sendar til metingar hjá metingarnevndini, §8, *stk.1*.
*Stk. 3.* Setanarnevndin gevur við støði í fakligu metingini hjá metingarnevndini og setanarsamrøðum við umsøkjarar rektaranum tilmæli um, hvør umsøkjari er best skikkaður til starvið, sæð út frá einum heildarsjónarmiði.

Stk. 4. Fyri akademisk undirvísingarstørv, har tað í starvslýsingini ikki verða sett ítøkilig krøv um granskingarførleikar og -royndir ella sum eru sett fyri tíðarskeið ikki longur enn eitt ár, kann rektarin geva loyvi til, at vikið verður frá metingarnevndini, so at umsóknirnar bert verða mettar í eini setanarnevnd (§ 9).
**§ 9.** Tá talan er um onnur størv enn granskingar- og undirvísingarstørv, verður ein setanarnevnd sett av rektara eftir tilmæli frá dekani ella fyrisitingarstjóra. Setanarnevndin viðger umsóknirnar eftir almennum fyrisitingarligum mannagongdum. Dekanur ella fyrisitingarstjórin letur rektaranum tilmæli um, hvør av umsøkjarunum úr einum heildarsjónarmiði er tann best skikkaði. Rektarin tekur endaliga avgerð og setur starvið.
*Stk. 2.* Verkætlanarstørv sum ph.d. og post-doc. verða sett eftir serligum avtalum og í samráð við rektaran.

**Tíðaravmarkaði undantøk**
**§ 10**. Rektarin kann í serligum førum gera tíðaravmarkaði undantøk frá reglunum omanfyri fyri fólk, sum eru í føstum starvi á setrinum. Rektarin kann eisini i undantaksførum seta fólk í tíðaravmarkaði størv í upp til eitt ár, men hesi størv kunnu ikki framleingjast uttan í heilt serligum undantaksførum og tá við greiðari tíðaráseting fyri framleingjanina.

**Arbeiðstíð og arbeiðsviðurskifti**
**§ 11.** Arbeiðstíðin hjá fólki í vísindaligum undirvísingar- og granskingarstørvum er býtt upp í granskingartíð, undirvísingartíð og fyrisiting. Í øllum trimum tættunum er talan um framleiðsluskyldu, sum skal skjalprógvast og góðkennast av dekani, sum hevur ábyrgd av, at hetta verður gjørt. *Stk. 2.* Øll í undirvísingar- og granskingarstørvum fáa setanarbræv við greiðum starvstreytum og starvsskyldum. Eisini skal standa í setanarbrævinum, at rektarin, eftir tilmæli frá dekani, fyrisitingarstjóra ella umsókn frá tí einstaka, kann broyta arbeiðstíðarlutfallið millum undirvísing, gransking og fyrisiting.

**§ 12.** Miðast skal ímóti, at tað innan eitt ávíst tíðarbil verður latin sama løn á øllum Setrinum út frá einum meritokratiskum sjónarmiði, soleiðis at tess hægri fakligi førleikin er, tess hægri verður lønin. Hartil koma so viðbøtur fyri serligar arbeiðs- og leiðsluuppgávur.
*Stk. 2.* Setrið hevur eina samstarvsnevnd við seks fólkum, við eins nógvum umboðum frá leiðslu og starvsfólkum.
*Stk. 3*. Yvirtíðar- ella úrtíðarløn verður bert latin við loyvi frá rektaranum eftir tilmæli frá dekani ella fyrisitingarstjóranum.
*Stk. 4.* Í sambandi við bygnaðarbroytingarnar skal Setrið taka umflokkingar av lønum upp við Lønardeildina. Saman við fakfeløgunum og Lønardeildini skal arbeiðast fyri, at førleikamenning verður viðurkend og raðfest í lønarsamráðingum.

Góðkent av stýrinum tann 5. desember 2017

Ólavur Ellefsen, formaður